Statoil Kring Føroyar:

Íslendingur sigraði

Gunnar Dahl-Olsen megnaði ikki at koyra tann góða minuttin, sum Hafstein Ægir Geirsson var frammanfyri undan tí síðstu etapuni, innaftur. Hóast fleiri royndir tók Hafstein altíð Gunnar aftur, tá hann royndi seg við útbroti

SÚKKLING

Stefan í Skorini
stefan@sosialurin.fo

Tað gjørdist aftur í ár ein útlendskur súkklari, ið fór avstað við heiðrinum í ársins Statoil Kring Føroyar. Íslendingurin Hafstein Ægir Geirsson megnaði at verja tann munin, sum hann hevði vunnið sær á etapuni í Eysturoynni.

25 ára gamli Hafstein helt allatíðina eyguni við tí 40 ára gamla Gunnari, sum var tann nærmasti kappingarneytin hjá íslendska súkklaranum, og Gunnar fann ongantíð tað neyðuga hegni at snýta tann sterka íslendska súkklaran.

- Eg royndi fleiri ferðir at sleppa frá Hafstein, men hóast eg royndi 10-15 ferðir, so tók hann meg aftur hvørja ferð, segði Gunnar Dahl-Olsen eftir kappingina sunnudagin.'

Hafstein Ægir Geirsson vann ta næstu etapuna, sum varð koyrd hósdagin í Eysturoynni, og hesin munurin gjørdist avgerandi, tá samanumkom. Hafstein var góðar tveir minuttir frammanfyri Gunnar Dahl-Olsen á hesum teininum, og tað megnaði Gunnar ongantíð at gera nakað við.

Bogi Kristiansen vann tvær ferðir

Bogi Kristiansen var eisini komin heim úr Danmark at luttaka í kappingini í ár. Hann var ongantíð ein hóttan ímóti Hafstein, men hann megnaði at vinna tvær tær síðstu etapurnar í Suðuroynni og á Eysturoynni.

Ein orsøk var allarhelst, at Hafstein Ægir Geirsson ikki legði nógv fyri at vinna tær síðstu etapurnar, men hann hevði ístaðin eyguni eftir Gunnari og forðaði honum í at sleppa avstað.

Men Bogi tók hendan møguleikan við báðum hondum og syrgdi fyri at vinna ein tryggan sigur í Suðuroy, og í Havn vann hann í endaspurtinum.

Hafstein sterkur

Hafstein Ægir Geirsson royndist sera drúgvur í hesi kappingini, og hann var klárt sterkasti súkklarin.

Spenningurin í kappingini var at kalla farin eftir ta næstu etapuna, tá Hafstein megnaði at vinna á Boga og Gunnar við meira enn tveimum minuttum. Hetta má sigast at vera eitt gott avrik av Hafsteini.

Tað er ein væl kend gongd í súkklukappingum, at ein av sterku súkklarunum vinnur sær ein fyrimun og síðani fer í verjustøðu restina av kappingini, og tað var júst soleiðis, at Hafstein fekk sigurin.

Eftir hetta vistu tey kønu innan súkkling, at Hafstein ikki fór at verða tikin av Gunnari ella Boga, sum ikki áttu nóg mikið í sær til at hótta íslendingin. Tað var so at siga bert eitt óhapp við neytum ella eitt punkterað hjól, ið fór at steðga Hafsteini á leiðini til sigurs í kappingini.

Hóast Hafstein var suverenur í kappingini, vóru fleiri góðar etapur, har aðrir gjørdu seg galdandi.

Í kappingini um fjallatroyggjuna vann danin Niels Bay Petersen. Hann vann allar fjallaspurtarnar og hevði tí fult stigatal í kappingini um fjallatroyggjuna.

Hafstein Ægir Geirsson vann sannførandi súkklukappingina Statoil Kring Føroyar. Myndin er tikin, eftir at hann hevur sigrað á etapuni í Eysturoynni

Mynd: www.tsf.fo

Endaligar tíðir og placeringar í Statoil Kring Føroyar 2005 20.07 - 24.07 VAKSIN

Navn	Felag	Klaksvík 8 km		Eysturoy 103 km		Sandoy 21 km		Suðuroy 77 km		Streymoy 109 km		Samlað tíð 318 km	Tíð eftir vinnara	Plac.
		Tíð	Plac.	Tíð	Plac.	Tíð	Plac.	Tíð	Plac.	Tíð	Plac.			
Hafsteinn Ægir Geirsson	HFR	00.11.16	2	03.05.58	1	00.29.42	3	02.39.20	3	03.04.07	3	09.30.23	09.30.23	1
Gunnar D. Olsen	TSF	00.11.12	1	03.08.05	3	00.28.46	1	02.39.20	2	03.04.07	4	09.31.30	+00:01:07	2
Bogi Kristiansen	CCG	00.12.04	8	03.08.05	2	00.30.13	4	02.38.23	1	03.04.02	1	09.32.47	+00:02:24	3
Niels Bay Petersen	CCG	00.12.17	9	03.11.29	4	00.30.55	8	02.39.21	4	03.04.03	2	09.38.05	+00:07:42	4
Eli Christiansen	TSF	00.11.31	4	03.15.05	5	00.30.25	5	02.43.43	5	03.04.25	5	09.45.09	+00:14:46	5
Gisli Karel Elisson	HFR	00.11.44	5	03.18.32	6	00.30.35	6	02.43.45	6	03.13.29	7	09.58.05	+00:27:42	6
Gunnlaugur Jonasson	HJM	00.11.19	3	03.26.07	8	00.29.36	2	02.43.53	7	03.13.29	6	10.04.24	+00:34:01	7
Esmar Joensen	TSF	00.12.00	7	03.26.07	7	00.31.24	9	02.59.46	8	03.13.32	8	10.22.49	+00:52:26	8
Keith Thomas Nielsen	KOC	00.13.40	11	03.35.55	9	00.34.42	11	03.03.20	10	03.28.25	9	10.56.02	+01:25:39	9
Sverri M. Edvinsson	TSF	00.13.00	10	03.51.13	12	00.33.16	10	03.06.51	11	03.33.21	10	11.17.41	+01:47:18	10
Mikki Bangtrup	RING	00.14.08	14	03.49.31	11	00.35.59	12	03.10.56	12	03.33.22	11	11.23.56	+01:53:33	11
Mogens Hendil	FR	00.14.00	13	04.07.40	13	00.36.36	13	03.38.08	13	03.47.57	12	12.24.21	+02:53:58	12
Evald Rasmussen	TSF	00.15.05	16	04.36.44	14	00.37.36	14	03.38.10	14	04.01.58	14	13.09.33	+03:39:10	13
Ikki gjøgnumført														
Jón Ellingsgaard	TSF	00.14.48	15	04.44.32	15					04.01.58	13			
Hans Krosstein	TSF	00.13.47	12											
Jan-Bo Petersen	NÆ	00.11.58	6	03.39.10	10	00.30.49	7	02.59.48	9					

24-07-2005 19.30
Tórshavnar Súkklufelag

Endaligar tíðir og placeringar í Statoil Kring Føroyar 2005 20.07 - 24.0720.07 - 24.07 UNGLINGAR

Navn	Felag	Klaksvík 8 km		Eysturoy 64 km		Sandoy 21 km		Suðuroy 60 km		Streymoy 80 km		Samlað tíð 233 km	Tíð eftir vinnara	Plac.
		Tíð	Plac.	Tíð	Plac.	Tíð	Plac.	Tíð	Plac.	Tíð	Plac.			
Torkil Veyhe	TSF	00.11.58	1	01.56.58	2	00.31.49	2	01.51.40	2	02.14.51	2	06.47.16	06.47.16	1
Jon Timotej	CCG	00.12.52	3	01.55.58	1	00.33.27	5	01.51.37	1	02.14.51	1	06.48.45	+00:01:29	2
Mads Siig Hansen	CCG	00.14.33	6	02.03.08	4	00.32.42	3	01.57.16	4	02.22.59	3	07.10.38	+00:23:22	3
Frederik Wolter Holm	OCC	00.11.59	2	02.12.20	7	00.30.58	1	01.53.34	3	02.23.08	4	07.11.59	+00:24:43	4
Sigmund Olsson	TSF	00.15.01	7	02.07.51	6	00.38.20	7	02.05.07	6	02.33.12	5	07.39.31	+00:52:15	5
Bergur Ingemarsson	TSF	00.13.13	4	02.04.25	5	00.34.02	6	02.05.07	5	02.44.28	6	07.41.15	+00:53:59	6
Ikki gjøgnumført														
Nikolaj Jakobsen	CCG	00.13.19	5	02.02.00	3	00.33.08	4	02.10.48	7					

24-07-2005 19.30
Tórshavnar Súkklufelag